# Mr. Bean skift til Morgan

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Kendi enski sjónleikarin Rowan Atkinson, betur kendur sum Mr. Bean, hevur skift sín gamla gula Austin Mini út við ein nýggjan Morgan Aero Max.

Talan er um ein av heimsins kvikastu bilum, sum hann hevur keypt fyri for 110,000 pund. Í Danmark kostar ein slíkur bilur um 2,5 milliónir krónur.

4,4 litra V8 motorurin hevur 333 hk, koyrir frá 0-100 km/t upp á 4,5 sekund og toppferðin er 274 km/t. Botntrekkið er upp á 450 Nm við 3.600 snún/min.

Tað verða einans gjørdir 100 bilar av júst hesum modellinum á Morgan verksmiðjuni nærhendis Birmingham í Onglandi. Rowan Atkinson mátti gjalda 25,000 pund í depositum, fyri at vera vísur í ein fáa ein av hesum hundrað bilunum.



*Ein glaður Mr.Bean við sínum nýggja Morgan Aero Max*



*Gamli guli Austin Mini hjá Mr. Bean er helst ein av heimsins kendastu bilum*





*Bert hundrað bilar verða gjørdir av júst hesum modellinum, Morgan Aero Max*







# Hyundai í luksusklassa

**Á bilaframsýningini í Detroit var ein heilt nýggjur bilur frá Hyundai sýndur fram. Talan er um Hyundai Genesis, sum er ein bakhjólsdrivin luksusbilur, sum serliga er gjørdur til at kappast á amerikanska marknaðinum**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*
*maggi@sosialurin.fo*

Hyundai hava leingi arbeitt við eini ætlan um at gera eina limousinu í luksusklassanum, og nú er komið so langt, at ein heilt nýggjur Hyundai Genesis varð frumsýndur á bilaframsýningini í Detroit í hesum mánaðinum.

Genesis er fyrsti Hyundai, sum einans verður drivin av bakhjólunum í nýggjari tíð.

Bilurin verður eftir ætlan til sølu bæði í Suðurkorea og í USA heilt skjótt. Genesis skal kappast við amerikansku og evropeisku luksusbilarnar í USA.

Í fyrstu atløgur verður Genesis gjørdur við tveimum V6 motorum (3.3 og 3.8 litra) við ávikavist 265 og 305 hk og einum 4.6 litra V8-motori við 380 hk. Seinni kemur eisini ein dieselútgáva. Allir útgávurnar fáast við einum heilt nýggjum 6-trins automatgirkassa.

Hyundai hava í nøkur ár havt Grandeur, sum eisini er ein stórur luksusbilur. Um hesin nýggi avloysir hann, verður einki sagt um. Um Genesis kemur til Evropa er ik-ki avgjørt enn.

# Peugeot og VW mest seldir í Danmark

Áttanda árið á rað bleiv Peugeot mest seldi persónbilur í Danmark í 2007 við næstan 20.000 seldum bilum og 12,2 prosentum av marknaðinum, nummar tvey varð Volkswagen við 8,5 prosentum og nummar trý varð Toyota við 8,4 prosentum av marknaðinum. Annars er Volkswagen mest selda bilmerki í Danmark, tá eru persónbilar, vørubilar, minibussar og smáir lastbilar roknaðir uppí. Peugeot er nummar tvey og Toyota nummar trý.



*Peugeot er mest seldi persónbilur í Danmark*



*Volkswagen mest selda bilmerki í Danmark, tá persónbilar, vørubilar, minibussar og smáir lastbilar eru roknaðir uppí*